# Føroya fyrsta gravarhjálp

**Føroyar hava fingið sína fyrstu gravarhjálp. Herman Eysturoy, ið hevur Snikkaravirkið í Marknagili, fer frameftir at bjóða fólkum sína hjálp, tá jarðarferðir skulu fáast frá hondini. Síðstu árini hevur hann smíðað kistur, og nú er tíðin komin at víðka um virksemi**

GRAVARHJÁLP
*Ingi Rasmussen*

Deyðin er líka natúrligur sum lívið. Men tá onkur doyr kann tað kortini virka ógvusligt, og tað kann vera møtimikið at yvirskoða ta mongd av praktiskum og løgfrøðiligum avgerðum, sum skulu takast í sambandi við eina jarðarferð.

Í Føroyum hevur ikki verið vanligt sum aðrastaðni, at nakar skipar fyri jarðarferðum burturav. Tey avvarðandi hava sjálv syrgt fyri øllum, hóast tey ikki altíð hava yvirskotið, sum skal til.

Tað er á hesum øki, at snikkarin í Marknagili, Herman Eysturoy, nú bjóðar sína hjálp.

– Tá eg byrjaði snikkaravirkið, setti eg mær fyri at gera okkurt, sum ongin annar gjørdi. Eg vildi ikki bara herma eftir hinum. Fyri trimum árum síðan fór eg undir at smíða kistur og fyri at økja um søluna má eg víðka. Tað, sum eg nú fari undir, svarar til tað, sum í Danmark eitur »bedemand«. Endamálið er at fáa eitt samlað konsept upp at standa, sigur Herman Eysturoy.

Sum frá líður kann vera, at hann eisini fer undir at koyra lík, men tað er ikki aktuelt. Og um tað verður gjørt, so verður tað í samráð við myndugleikarnar, sum syrgja fyri hesum í dag.

Herman skal taka sær av jarðarferðini sjálvari. Hann bíleggur kirkjuna, tosar við gravarar, tekur sær av pappírsarbeiði og fær upplýsingar til viðkomandi myndugleikar. Tað kann vera ein deyðsváttan, sum skal gerast, persónligir upplýsingar til kirkjukontórið og skiftirættin.

Hann tekur sær eisini av praktiskum uppgávum, líka frá at leggja líkið í kistuna til at prenta sangir. Og so borgar hann fyri, at jarðarferðin fer fram so virðiliga sum til ber og fyribyrgir mistøkum.

Er onkur deyður uttanlands, skipar Herman fyri at fáa viðkomandi heim. Ynskir onkur at brennast, bjóðar hann seg eisini fram at fáa líkið av landinum til brenningar, og tá urnan kemur heimaftur verður hon jarðað.

– Tað hevur ikki verið siður at brenna, men tað hevur heldur ikki verið eitt tilboð til føroyingar. Um ikki farið verður yvir til at brenna, so verður Havnin skjótt ein stórur kirkjugarður, so tað kann gerast neyðugt. Og hví ikki? Í Danmark verða 75 prosent av øllum brend, men so leingi onki krematorium er í Føroyum, verður tað helst undantakið, sigur Herman.




# Eitt lívgevandi arbeiði

**At hjálpa fólkum í neyð kann vera lívgevandi. Fólk eru takksom og fyrikomandi, sigur Herman Eysturoy, sum er farin undir gravarhjálp. At fáast við deyðan gerst ein vani, men tað ræður um altíð at vísa virðing, og tað kemur meira enn so fyri, at tú ávirkast av einum deyðsfalli**

GRAVARHJÁLP
*Ingi Rasmussen*



*Hermann Eysturoy er Føroya fyrsta gravarhjálp.*
*Mynd: Jens K. Vang*

Tað er lívgevandi at fáast við deyðan.

Soleiðis sigur Herman Eysturoy, snikkari, sum er Føroya fyrsta gravarhjálp. Síðstu trý árini hevur hann fingist við at smíða kistur. Og nú víðkar hann um virksemið, so tað eisini fevnir um at skipa fyri øllum tí praktiska í sambandi við jarðarferðir.

Sostatt hevur hann síðstu árini longu fingist við deyðan. Hann hevur smíðað umleið 100 kistur um árið og hevur soleiðis verið í sambandi við nógv fólk, sum hava mist ein av sínum kæru. Men tað er kortini ikki, tí at ein gravarhjálp hevur verið eftirspurd, at hann nú er farin undir nýggja virksemið.

– Fólk hava ikki biðið um hetta beinleiðis, og eg kann ikki siga, at tað beinleiðis hevur verið ein tørvur, men eg havi merkt strongd á nógvum, tí so nógv er at skipa fyri í sambandi við deyðan og eina jarðarferð. Fólk, sum eg havi tosað við, eru øgiliga positiv, og eingin hevur sagt seg vera ímóti, sigur Herman Eysturoy.

### Fólk avgera sjálv

Onkur prestur hevur ført fram, at tað er neyðugt, at tey avvarðandi skipa fyri praktiskum málum sjálv í sambandi við eina jarðarferð. Tað hjálpir teimum at koma yvir sorgina og er eisini ein máti at siga farvæl við tann, tey hava mist.

– Mín ætlan er ikki at taka alt frá teimum syrgjandi. Tað er sjálvandi gott, um fólk sjálv eru við. Tey skulu sjálv gera av, hvussu jarðarferðin fer fram. Eg kenni alla mannagongdirnar og kann hjálpa, so teimum ikki nýtast at vera bangin fyri at hava gloymt nakað, tí nógv er at syrgja fyri. Um tey hava eina trygd fyri, at tað verður syrgt fyri øllum, kunnu tey róliga og uttan strongd skipa jarðarferðina, sum tey ynskja. Hetta merkir ikki, at allar jarðarferðir vera eins. Tvørturímóti, sigur Herman.

### Varðveita siðir

Hóast hann leggur á nýggjan bógv, nú hann fer undir gravarhjálp, so heldur hann tað hava alstóran týdning, at føroyingar varðveita siðirnar í sambandi við jarðarferðir. Eitt nú heldur hann, at líkfylgi er ein týðandi táttur í føroysku mentanini.

– Tað kann væl vera, at eitt líkfylgi stegðar ferðsluni í havnargøtum, men tann prísin mugu vit gjalda, og so stóran skund hava vit heldur ikki. Tað hevur nógv at siga sálarliga fyri tey avvarðandi at fylgja líki. Fólk fáa tosað saman um tann farna, og tað loysir upp fyri sorgini. Tað er eisini hugaligt at síggja fólk, sum koma fram við líkfylgi, steðga á og vísa virðing fyri teimum, ið fara. Tað eiga vit at hava tíð til, sigur Herman.

### Einki deydligt

Herman hevur brynjað seg til nýggju avbjóðingina og hevur eitt nú arbeitt hjá tveimum biðimonnum í Danmark fyri at læra seg upp. Spurdur, um tað ikki er nakað tungligt, at arbeiða við kistum og nærum hvønn dag tosa við fólk í sorg, svarar hann noktandi.

– Tað er als ikki trykkjandi. Hinvegin er tað lívgevandi at kunna geva frá tær, tá fólk í neyðini hava brúk fyri hjálp. Tað vísir seg eisini, at fólk altíð eru blíð, takksom og fyrikomandi, sigur Herman.

Ikki øll høvdu tolað arbeiðið, sum eisini gerst ein vani við tíðini.

– Tað er innbygt, trúgvi eg. Antin dugir tú at møta fólkum, sum syrgja, ella dugir tú tað ikki. Eg havi verið brandmaður í nógv ár, so eg havi sæð og uppliva eitt sindur av hvørjum, men tað er umráðandi altíð at vísa virðing, sjálvt um tað gerst ein vani. Sjálvandi vilja tað altíð vera støður, tá tú ávirkast, og um tað eru børn ella ung, sum eru farin, so kunnu tár meira enn so fella, sigur Herman.

### Lítið skemt

Tey flestu kenna biðimenninar frá teknirøðunum. Teir skunda sær til, tá líkt er til, at fólk kunnu lata lív, gníggja sær í hondunum, tí nú eru nakrar krónur at vinna. Men hatta er langt frá veruleikanum, sigur Herman flennandi.

– Eg eri ikki keddur av, at fá fólk doyggja ein mánað. So fái eg bara meira at gera næsta mánaðin, tí tað vísir seg, at miðaltalið er javnt. Eg spinni ikki gull upp á deyð fólk. Hetta er ein forrætning sum alt annað. Skalt tú fáa nakað burturúr, so mást tú arbeiða hart, sigur Herman.

Sjálvandi kemur fyri, at onkur ger gjøldur burtur úr hansara vinnuvegi, men tað er meiri sjáldsamt.

– Fólk, sum eg kenni væl, kunnu koma við onkrari speiskari viðmerking, men eg haldi, at fólk eru farin at taka hetta í størri álvara. Tey tora ikki so væl at skemta og verða beinanvegin álvarslig, um tey hava sagt okkurt í spei, sigur Herman.

Á snikkaravirkinum hevur Herman eisini vanligar uppgávur sum at smíða trappur, vindeygu og annað, men so hvørt sum gravarhjálpin vindur upp á seg væntar hann, at vanliga snikkaraarbeiði fer at minka samsvarandi. Enn eru bara hann og pápin í arbeiði, men tað kann hugsast, at fólk verða sett til seinni.



# Óvissa um útgerðarhavnina í Runavík

**Stjórin Lassi Borðoy er sera ørkymlaður av at frætta, at boringin byrjar hvørja løtu, tí enn er eingin bílegging komin til útgerðarhavnina í Runavík. Hann stendur spyrjandi um, hvussu man kann servisera ein brunn úr Føroyum, tá eingin útgerð og tilfar av nøkrum slag er komið til útgerðarhavnina**

4. BRUNNURIN
*Jan Müller*



Antin í gjár, í dag ella í morgin skuldi 4. boringin á landgrunninum fara í gongd. Til allar tær undanfarnu tríggjar boringarnar hevði útgerðarhavnin í Runavík ein týðandi leiklut. Haðani varð nógv vøra so sum rør og kemikalur flutt út á pallarnar. Støðan hesaferð tykist vera øðrvísi. Í hvussu er stendur stjórin hjá Atlantic Supply Base, Lassi Borðoy sum kánus.

- Eg haldi tað vera sera løgið at fara undir eina verkætlan fyri umleið 200 mill. kr., sum skal serviserast úr Føroyum, uttan at eitt einasta kolli – ikki eitt gramm er komið til Runavík enn, tveir dagar áðrenn byrjað verður at bora sigur Lasse Borðoy. Tað er krav sambart grein 10 og 11 í løgini, at boringarnar skulu serviserast úr Føroyum vísir hann á.

- Vit skulu hava alt tilfarið og vørur klárt eftir fráboðan frá felagnum, sum stendur fyri boringini. Vit hava roynt at fáa samband við fyristøðufelagið ENI/Agip uttan tó at fáa nakað svar.

Stjórin á útgerðarhavnini sigur, at tað vanliga hevur verið við hinar boringarnar, at tað, sum skal brúkast umborð undir boring, skal umvegis føroyskan kaikant, áðrenn tað fer út á pall ella boriskip.

Lassi Borðoy vónar ikki, at ENI ætlar at broyta praksis, sum hevur verið galdandi við hinar boringarnar og heldur fáa útgerð og tilfar umborð beinleiðis frá bretskari havn. Hann sigur annars, at teir hava havt gott samband við italska felagið alt hetta seinasta árið, nú boringin varð útsett í eitt ár. – Tey hava verið góð at tosa við og tað er ikki meira enn ein mánaði síðani, at logistikkstjórin hjá felagnum var á vitjan í Runavík, har hann hugdi eftir øllum umstøðunum á økinum í Runavík.

Hvat tosa vit so um! Lassi Borðoy sigur, at tá Statoil byrjaði at bora var talan um eini 1000 tons av casing og 400 tons av kemikalum umframt serútgerð og nógv annað. Tá var alt økið fult við útgerð, sum kom í góðari tíð.

ENI hevði annars biðið um fund við útgerðarstøðina fyrrapartin fríggjadagin. – Eg veit ikki, hvat tey fara at siga við okkum, men eg fari at gera vart við, at vit halda ikki, at hetta er farið rætt fram. Lassi Borðoy sigur seg hava frætt, at boriskipið hevur tikið útgerð til 10 dagar umborð. – Vit hava fingið at vita, at tað liggja millum 300 og 400 tons av casing og bíðar, sum kemur upp við supplybáti einaferð, men eg veit ikki nær. Vanliga verða brúkt 1000 tons, so eg spyrji bara, hvar hini 700 tonsini eru! Hevur tú 700 tons av casing umborð, so røkkur tað til tann fyrsta mánaðin og ikki til 10 dagar. Eg skilji so heldur ikki, hvussu man ætlar at fáa matvørur út á pallin, tí her eru ongar bingjur heldur.

Nógvur peningur stendur uppá spæl hjá bæði havnini og feløgunum í Runavík. Útgerðarhavnin hevur roknað við einum umsetningi uppá millum 8 og 10 mill. kr. hesar báðar mánaðirnar boringin varar. So kemur Skipafelagið aftrat, sum skal lasta og lossa vøruna. Tað er eisini ein partur av avtaluni. Í báðum førum eru fleiri fólk sett til hesi arbeiði.

Men her er ikki bara talan um stóran miss fyri bæði útgerðarhavnina og Skipafelagið. Tað er tað eisini fyri Runavíkar havn, sum harvið missir vørugjaldið og havnagjald, ið kemur væl við, nú kommunan hevur gjørt stóra íløgu í eitt nú eina oljuhavn.

Luca Dragonetti frá ENI (Agip) :

# Vildu ikki leggja okkum út í verkfallið

**Talan er bert um tímar til fyrsta skipið kemur við útgerð til útgerðarhavnina í Runavík. – Vit fara liva upp til okkara skyldur og tað fer at vera úr at gera har næstu tíðina har sigur Luca Dragonetti, frá ENI, sum vísir á, at teir hava hildið seg kúrrar orsakað av verkfallinum. Nú kemur tó gongd á**

4. BRUNNURIN
*Jan Müller*



- Eg skilji ikki, at misnøgd skal vera í Runavík. Hetta má byggja á misskiljingar, tí vit hava alla tíðina havt ætlan um at brúka útgerðarhavnina har. Vit fara at fylgja reglunum. Hetta sigur Luca Dragonetti, sum stendur á odda fyri leitingini á landgrunninum í eini viðmerking. Umboð fyri ENI (Agip) vóru í gjár á fundi við leiðsluna fyri Atlantic Supply Base.

Luca Dragonetti sigur, at teir eru partnarar í útgerðarhavnini og fara at rinda sín part. - Vit fara at brúka útgerðarhavnina sum ætlað og sum øll hini feløgini hava gjørt tað undan okkum. Vit eru longu byrjaðir og hava eitt nú testað sementið.

Luca Dragonetti vísir annars á verkfallstøðuna, sum hevur verið í Føroyum. Tað hevur verið ein støða, sum teir sum oljufelag á ongan hátt hava ætlað at lagt seg út í. Teir hava tí roynt at fyrihalda seg friðaligar. Men Luca Dragonetti er vísur í, at tey í Runavík fara at hava úr at gera frá tí løtu fyrsti báturin kemur við útgerð. Talan er um sera stutta tíð, helst longu í vikuskiftinum. – Nú fer nógv at henda har og tað skjótt eisini. Talan er kanska bara um tímar.

Tað seinasta:

# Rudda misskiljingar av vegnum

4. BRUNNURIN
*Jan Müller*

Fyrrapartin í gjár var fundur í Runavík millum umboð fyri Atlantic Supply Base og ENI. Lassi Borðoy stjóri sigur, at hann er nøgdur við úrslitið av fundinum. – Tað hevur helst verið ein spurningur um manglandi samskifti, sum er orsøkin til naggatódnina, men vit hava nú fingið váttað, at bátur er á veg við útgerð úr Aberdeen og verður her sunnudagin ella mánadagin. Boriskipið hevur tó so frægt av útgerð umborð, at tað ber til at seta á undirgrundina. Nú mugu vit so bara taka tað her frá og síggja, hvussu tað fer at spæla av. So eftir øllum at døma verður fult virksemi í útgerðarhavnini í Runavík frá í næstu viku. Boringin er mett at vara í knappar tveir mánaðir.